Túsundtals fólk til festival á bryggjuni í Stavanger



fólk av Stavanger-leiðini vestur um hav.

## Ídnaðarbýur

Tað tók tó ikki langa tíð hjá Stavanger at menna seg aftur eftir kreppuna, og nakað undan aldarskiftinum gekk aftur tann rætta vegin. Tað var aftur fiskivinnan og serstakliga fiskaídnaðurin á landi, sum legði grundarlagið undir framburðin, og fyrst í 1920-unum var Stavanger vorðin ein nútímans ídnaðarbýur. Hesi árini vaks fólkatalið í býnum úr 30.000 í 1900 til 44.000 í 1920.

Fiskavirkini á landi virkaðu fisk til altjóða marknaðin, so menn, sum fyrr høvdu verið í handverksvinnuni ella umborð á handilsskipum, arbeiddu nú við at niðursjóða fisk. Men vandi er í hvørjari vælferð, og tað vísti seg, at vinnulívið var ov einsáttað, og at Stavanger var ov nær tengdur at viðurskiftunum í umheiminum, tí at kalla øll framleiðsla var tengd at keypiorkuni í øðrum londum. So tá kreppan ímillum teir báðar heimsbardagarnar fór at gera vart við seg, rakti hon Stavanger serliga meint.

Árini frá 1930 til 1934 vóru merkt av stórum arbeiðsloysi, og minkandi inntøkurnar gjørdu, at kommunan noyddist eisini at avmarka sítt virksemi, og tað bøtti ikki um støðuna. Í 1934 vendi gongdin aftur tann rætta vegin, men týska hersetingin undir heimsbardaganum elvdi aftur til trupulleikar og tær avmarkingar, sum ein herseting ber í sær.

## Oljubýur

Miðskeiðis í sekstiárunum byrjaði oljuleitingin í Norðsjónum, og hendan nýggja vinnugreinin skapti eina heilt nýggja støðu. Stavanger hevði tann fyrimun, at býurin lá rættiliga høgliga fyri, og harafturat kundi hann bjóða hesari nýggju vinnuni góð havnarviðurskifti og gott flogsamband, og harafturat var býurin so mikið stórur, at hann kundi bjóða vinnuni tað mesta, sum henni tørvaði.

Bæði teir lokalu politikararnir og vinnulívsfólk gjørdu alt fyri at tekkjast oljuvinnuni, tí menn vildu fegnir hava arbeiðspláss burturúr. Stór, altjóða oljufeløg settu seg niður í býnum, og tað lokala vinnulívið legði seg eftir at fáa sáttmálar sum veitarar hjá teimum stóru feløgunum. Hetta gjørdi, at Stavanger gjørdist tann týdningarmesti oljubýurin í Noregi, og hendan støða bleiv av álvara staðfest í 1972, tá Stórtingið samtykti at lata almenna oljufelagið Statoil og oljufyrisitingina hava høvuðsstøð í býnum.

Hendan menningin helt fram tey næstu árini, og býarmyndin var merkt av bæði privatari og kommunalari vælferð. Men tey seinastu 25 árini hevur tað almenna táttað í, og tað er ikki sørt, at tey í Stavanger hava hug at leggja landsmyndugleikarnar í Oslo undir at tálma vøkstrinum í býnum.

## Vitan og mentan

Tað stóra virksemið í sambandi við oljuvinnuna hevur havt ovurstóra ávirkan á Stavanger-leiðina. Í 1970 búðu 80.000 fólk í býnum, men nú liggur talið um 115.000. Vøksturin stavar bæði frá norskum og útlendskum tilflytarum, og tað er ikki ov nógv sagt, at tey fremmandu, sum serliga komu úr Vesturevropa og USA, settu sín sjónliga dám á býarmyndina.

Hesin stóri og fjølbroytti vøksturin hevði politiskar, sosialar og mentanarligar avbjóðingar við sær, og hesi árini er nógv hent á tí mentanarliga økinum, eitt nú innan leiklist og tónlist, samstundis sum býurin hevur fingið fleiri søvn afturat.

Á útbúgvingarøkinum og granskingarøkinum hevur menningin eisini verið stór, tí tað verður hildið at vera ein fyritreyt fyri einari vælvirkandi nútímans vinnu. Háskúlin í Stavanger gjørdist ein tann størsti í landinum við umleið 7.000 lesandi, áðrenn skúlin fyri fimm árum síðani fekk støðu sum lærdur háskúli við heitinum Universitetet i Stavanger.

*(Kelda: www.stavanger.no)*